# LØGTINGSVAL04



**TERJI RASMUSSEN**
*Sjálvstýrisflokkurin, Suðurstreymoyar valdømi*



**NIELS UNI DAM**
*Tjóðveldisflokkurin, Suðurstreymoyar valdømi*

# Nýggjur táttur

Sosialurin fer teir komandi 14 dagarnar at royna ein øðrvísi og heldur lættari tátt, har vit spyrja tvey valevni hvørjaferð, sum ikki hava sitið á tingi ella verið landsstýrisfólk áður, ymsar spurningar um eitt ávíst evni.

Evnið er eitt, sum valevnini á ein ella annan hátt hava tilknýti til í teirra "sivila" lívi. Og eru tey ikki úr sama flokki.

Vit hava til dømis lagt út við teimum báðum Terja Rasmussen og Niels Una Dam, sum stilla upp fyri ávíkavist Sjálvstýrisflokkin og Tjóðveldisflokkin. Vit spyrja teir nakrar spurningar um tónleik, sum teir báðir hava tætt tilknýti til uttan fyri valorrustuna.

Onkrir av spurningunum, sum valevnini fáa, eru meira opnir, har tey fáa møguleika til at siga nøkur ting, meðan aðrir verða meira konkretir. Og so eru onkrir meira skemtiligir. Hetta fyri at gera táttin eitt sindur lættari og meira skemtiligan. Spurningarnir koma at verða millum tríggir og fimm í tali hvørjaferð.



## tónleikur

*Hvørjar ætlanir hevur tú viðvíkjandi umstøðunum hjá føroyskum tónleikarum?*

Eg haldi, at hugburðurin víðvíkjandi tónleiki skal broytast í Føroyum. Heldur enn at síggja tónleik sum eina útreiðslu skal tónleikur síggjast sum ein íløga. Vit áttu at gjørt eitt alment partafelag, sum hevði til uppgávu at útflyta føroyskan tónleik uttanlands. Fremsta uppgávan hjá felagnum skal at promota føroyskan tónleik uttanlands

Tónleikur er mítt hjartamál. Fyrst og fremst skulu pengar játtast til spælistøð kring alt landið. Her má landið og kommunur fara inn og stuðla. Fuglafjørður og Mentunnarhúsið er ein fyrimyndarlig sólskinssøga hesum viðvíkjandi. Eisini er týdningarmikið, at tónleikarar fáa betri møguleikar at koma í bæði venjingarhølið og upptøkuhølið og taka eitt nú demofløgur upp

*Hvussu fáa vit Kodaskipanina at virka betur?*

Eg haldi, at Koda skipanin riggar væl sum er. Trupulleikin liggur ikki hjá Koda, men hjá útvørpunum.Útvarp Føroya og Koda gjørdu í sínari tíð eina avtalu, sum hevur við sær, at minni lá eftir tónleikararunum. Skal skipanin betrast, mugu útvørpini broyta avtaluna við Koda, so at meir peningur liggur eftir hjá tónleikarum

Kodaskipanin virkar fínt. Trupulleikin er, at tónleikarar ikki fylla pappírið rætt út. Tær ferðirnar, eg sjálvur havi gjørt tað, havi eg eisini fingið nokk burturúr

*Røkir FUT sín leiklut til fulnar?*

Eg eri í dag hvílandi limur í FUT, men eg haldi kortini ikki at felagið røkir sína uppgávu. FUT átti at virka sum eitt fakfelag fyri tónleikararnar. Politikkararnir í Føroyum hava í dag einki fakfelag at diskutera spurningar, sum hava við tónleik at gera. Henda leiklut átti FUT at havt fyri føroyskan tónleik

Endamálið við FUT er, at tað skal virka sum eitt fakfelag, ið savnar pengar til eitt fakfelag fyri tónleikararnar. Tað ger FUT ikki sum nú er. Uppgávuna sum konsertfyrireikarar og fløguútgevarar røkja teir kortini væl

*Hvønn bólk dámar tær betur All That Rain ella Gestir?*

Mær dámar betur Gestir. Tónleikurin hjá Gestum er meira meliødøsur og sveimandi og tað dámar mær betur enn tónleikin hjá All That Rain

All That Rain eru betri samanspældir og kanska betri fyri tekniskt eisini. Gestir duga betri at skriva góð løg. Hatta fer tó altíð at vera ein spurningur um smag.

**phj/ka**

# Stuðulskonsert til frama fyri AIDS-rakt børn

**Hornorkestrið á Tvøroyri skipaði sunnudagin fyri væleydnaðari stuðulskonsert, ið savnaði góðar 10.000 kr. til vælgerandi hjálpararbeiði í Suðurafrika**

INNSAVNING
*Bartal Nolsøe Poulsen*

Farna sunnudag skipaði Tvøroyrar Hornorkestur fyri heldur forkunnugari konsert í kirkjuni á Tvøroyri. Helgi Enni, sum er formaður í orkestrinum sigur, at tey høvdu havt eina sera væleydnaða konsert í Hvalba 1. nýggjársdag, so avgjørt var at royna at endurtaka bragdið. Sostatt kom konsertin í lag við stuttum skotbrái. Haraftrat varð avgjørt at skipa fyri peningainnsavning til AIDS-rakt børn í Cape Town.

Sosialurin skrivaði stutt undan jólum um innsavning, sum Steintór Rasmussen, Sámal Bláhamar og Hans Eiler Hammer eru farnir undir, til frama fyri foreldraleys gøtubørn og eitt barnaheim í Suðurafrika. Í tí sambandi hava teir tríggir tikið stig til tvær vælgerandi stuðulskonsertir í Klaksvík og Tórshavn ávíkavist 17. og 18. januar, og tað var við hesum sum íblástri at Tvøroyrar Hornorkestur saman við Brandi og Trónda Enni, og Guðruni Sólju Jacobsen avgjørdu at sameina eina hugnaliga konsert við peningainnsavning til hetta vælgerandi endamálið.

Av Tvøroyri verður sagt, at hóast konsertin kom so brádliga í lag, var undirtøkan stak góð. Jónsvein Bech, prestur, metir, at eini 350 fólk vóru til konsert í kirkjuni á Tvøroyri sídsta sunnudag. Góðar 10.000 kr. komu í bússurnar.

### Sjávboðin stuðul

Hans Eiler Hammer, prestur, ið er ein av stigtakarunum til landsumfevnandi innsavningina sigur, at hann og nevndin eru ótrúliga glað fyri konsertina á Tvøroyri. – Hatta var júst tað, vit høvdu vónað, at fólk runt um í landinum sjálvboðin taka stig til at stuðla verkætlanini, sigur hann í telefonini úr Klaksvík.

Hans Eiler Hammer sigur, at umframt stuðulskonsertirnar, sum vera um smáar tvær vikur, er møguleiki at stuðla verkætlanini við at lata peningagávu á konto í peningastovnunum. Innsavningin heldur fram til fyrst í februar.

# Ársins Fyrstahjálpari 2003

TÍÐINDASKRIV

Reyði Krossur Føroya sóknast eftir evnum at heiðra sum Ársins Fyrstahjálpara 2003. Hann, sum verður kosin Ársins Fyrstahjálpari fær heiðursbræv frá Reyða Krossi umframt peningagávu, sum Tryggingarfelagið Føroyar letur.

Tann, sum er í uppskoti. skal í farna ári á serligan hátt hava givið kropsliga ella sálarliga fyrstuhjálp.

Endamálið er ikki einans at tilnevna Ársins Fyrstahjálpara 2003, men eisini at eggja øðrum at læra seg fyrstuhjálp, so fleiri mannalív kunnu bjargast

Politi, bjarginarfeløg, virkir, stovnar og einstaklingar kunnu lata inn uppskot, ið verða viðgjørd av nevndini í Reyða Krossi Føroya

Serligt oyðublað, ið er sent politistøðunum kring landið og annars fæst frá Reyða Krossi, skal sendast Reyða Krossi Føroya í seinasta lagi 31. januar 2004, verður sagt í tíðindaskrivi frá Reyða Krossi.




